# Smábygdir vilja við í útoyggjafelagið

**Smáar bygdir á meginøkinum hava sýnt útoyggjafelagnum áhuga, tí tey halda seg hava somu trupulleikar sum útoyggjarnar. Stigtakararnir skulu nú kanna, hvønn leiklut hesar bygdir kunnu fáa í nýggja felagnum**

ÚTOYGGJAR
*Eyðun Klakstein*

Bygdir í Eysturoynni og á Streymoynni sýna nú áhuga fyri útoyggjafelagnum, sum ætlanin er at stovna. Hesar bygdir halda seg hava líknandi trupulleikar at dragast við, sum útoyggjarnar hava.

– Vit hava langt síðani ásannað, at vit koma ongan veg við at stríðast einsamøll. Tí fara vit við í útoyggjafelagið, um vit sleppa við, sigur Lars Gunnar Dahl-Olsen, sum situr í bygdaráðnum í Saksun.

– Tankin um at verða við í útoyggjafelagnum er áhugaverdur, tí tað tað eru nógvar smábygdir í Eysturoynni og Streymoynni, sum stríðast fyri at yvirliva, sigur Sofus Johannesen, sum er bygdaráðsformaður við Gjógv.



*Bygdir sum Gjógv og Saksun sýna útoyggjafelagnum áhuga. Fleiri smábygdir á meginøkinum halda seg vera í líknandi støðu sum útoyggjarnar*

## Somu trupulleikar

Ein av stigtakarunum til útoyggjafelagið, Olga Biskopstø, sigur, at arbeiðsbólkurin fer at viðgera støðuna hjá smábygdunum.

– Vit tosaðu um hetta á fundinum í Havn mikudagin, og tað varð avrátt, at arbeiðsbólkurin skuldi kann, hvønn leiklut hesa bygdirnar kunnu fáa í einum útoyggjafelag, sigur Olga Biskopstø.

Hon vil ikki útilokað, at smáar bygdir, sum eru í líknandi støðu sum útoyggjarnar kunnu koma við í felagið.

## Eingin ivi

Í Saksun eru tey avgjørd í, at tey vilja við í útoyggjafelagið.

– Vit eru fullkomiliga afturúrsigld, og hóast við íðin hava roynt fingið ymiskt gjørt í bygdini, so spyrst einki burturúr.

– Tí hevði tað verið gott, um vit kundu komið í felag saman við onnur, sum hava somu trupulleikar. Á tann hátt høvdu vit staðið sterkari í stríðnum, heldur Lars Gunnar Dahl-Olsen, sum er bóndi í Saksun.

## Kanska í verandi felagi

Bygdaráðsformaður við Gjógv heldur, at støðan hjá útoyggjunum og bygdum sum Gjógv líkist, men hóast er eitt sindur ymisk.

– Vit kenna nógvar av trupulleikunum aftur, men tá talan til dømis er um samferðslu, so er støðan ikki tann sama. Eg veit ikki, um tað er besta loysnin at fara við í eitt nýtt felag, tí kanska hevði tað borið til at havt ein bólk innan fyri kommunufelagið, sum arbeiddi fyri smábygdunum, heldur Sofus Johannesen.

– Men tað er avgjørt ein áhugaverdur tanki, at bygdir í Eysturoynni og Streymoynni kunnu koma við í útoyggjaarbeiðið, tí tað er ein sannroynd, at nógvar av hesum bygdunum hava tað sera trupult, sigur hann.









# Útihýsir ikki at Havnin fer at spreingja markið



*– Tað verður neyðugt hjá landsstýrinum og okkum at gera eina neyðloysn um útbyggingar í Havnini tey næstu árini, annars fáa vit ein veldugan trupulleika, eitt nú fer Býráðið ikki einsamalt at betala útbyggingar, sum eru neyðugar til nýggja Suðuroyarskipið*

**– Vil landsstýrið ikki samstarva við okkum, kann tað ikki útihýsast, at vit ikki fara at akta boðini um, hvussu nógv, vit kunnu byggja út fyri um árið, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri**

KOMMUNALAR ÚTBYGGINGAR
*Áki Bertholdsen*

Havnar kommuna er komin so illa fyri, at borgarstjórin útihýsir ikki møguleikan fyri at Býráðið fer at seta seg upp ímóti Landsstýrinum.

Jan Christiansen sigur, at Tórshavnar Kommuna hevur átrokandi tørv á at byggja so nógv út, at hon hevur ongan møguleika at halda seg innanfyri útbyggingarhámarkið upp á góðar 70 milliónir, sum Landsstýrið sigur, at kommunan fær næsta ár.

– Tí kann tað ikki útihýsast, at vit vera noydd til at spreingja útbyggingarkvotuna, sum landsstýrið hevur álagt okkum.

Hann vísir á, at nýggj Norrøna kemur í 2003 og nýggj suðuroyarferja í 2004.

Í sambandi við nýggju Norrøna verður tað neyðugt at byggja havnarlagið út fyri góðar 30 milliónir og tað sama til nýggja Suðuroyarskipið.

– Útbyggingin til nýggju Norrønu, er Tórshavnar Havn sinnað at gera fyri viðskiftafólk síni. Men hetta er ein útbygging, sum kemur øllum landinum til góðar. og tí kann tað á ongan hátt dragast frá útbyggingarkvotu okkara.

– Nýggja Suðuroyar skipið er eitt tiltak, sum landið hevur ført inn á okkum, uttan at vit hava havt nakra ávirkan á tað. Samstundis vita vit, at landið ætlar at byggja nýggja samferðsluhavn, bæði í Vági og á Tvøroyri.

– Tí gongur Tórshavnar Kommuna heilt einfalt ikki við til, at hon einsamøll skal betala útbyggingarnar, sum eru neyðugar í Havn, fyri at skipið kann leggja at í høvuðsstaðnum.

Hann sigur tí, at betalir landið ikki ein part av útbyggingini til nýggja suðuroyarskipið, verður ongin útbygging gjørd.

## Spreingja markið

Jan Christiansen sigur, at ongin ivi skal vera um, at Tórshavnar Kommuna er sinnað at ganga Landsstýrinum á møti í royndunum at hava tamarhald á búskaparpoltiikkinum.

Tí er Tórshavnar Kommuna eisini sinnað til at avmarka sínar útbyggingar fyri at tálma búskapinum so at hann ikki gerst ov heitur.

– Undir vanligum umstøðum hevði ein útbyggingarkvota upp á 70-75 milliónir verið ivaleyst hjá Tórshavnar Kommunu.

– Hinvegin er støðan tann, at Kommunan hevur ligið at kalla heilt still øll kreppuárini, tí tá vóru ikki umstøður til at gera nakað sum helst.

– Tí eru nógvar útbyggingar, sum liggja láni. Samstundis veksur Havnin nógv hesi árini.

Borgarstjórin sigur, at alt hetta ger, at tørvurin á útbyggingum er sera stórur og Kommunan klárar seg ikki tey næstu árini við tær 70-75 milliónirnar, sum kommunan kann byggja út fyri.

– Tað verður tí neyðugt hjá landsstýrinum og okkum at semjast um eina væl hægri útbyggingarkvotu í eitt, tvey ár. Tá eru vit komin uppundan og so kunnu halda okkum innanfyri tær 70-75 milliónirnar

– Vil landið ti ikki betala ein part av samferðsluhavnini til nýggju suðuroyarferjuna, og ber tað ikki til at fáa íløgukvotuna hækkaða, fáa vit ein stóran trupulleika: Tá skulu vit velja, antin vit skulu byggja nýggjar barnaansingarstovnar, ella skúlar, sum lógin áliggur okkum, ella um vit skulu byggja havnarlagið út.

– Fáa vit ein trupulleika av hesum, fær landið ein nógv størri trupulleika, sum vit velja dagstovnarnar og skúlarnar framum havnarlagið.

Men ein triði møguleiki er, at Tórshavnar Býráð ger av at ignorera útbyggingar hámarkið hjá landsstýrinum.

– Landsstýrið hevur onga heimild at áleggja okkum eina útbyggingarkvotu. ùtbyggingarkvotan er tí ein avtala ímillum kommunurnar og landið

– Men tað skerst ikki burtur, at vit føla okkum provokerað, tí Landsstýrið vil ikki skilja okkara støðu. Og tað kann ikki útihýsast, at vit føla okkum so nógv provokerað, at vit gera av at ignorera Landsstýrið og at byggja tað út, sum er neyðugt fyri at høvuðsstaðurin skal kunna liva og virka, sigur Jan Christiansen.

# Fleiri eru vælkomin upp í

**Borgarstjórin í Runavík er heitur talsmaður fyri, at fleiri kommunur á Skálafjørðinum leggja saman**

KOMMUNUSAMANLEGGING
*Áki Bertholdsen*

Tað er als ikki óhugsandi, at um nøkur ár, verður ein stórur partur av Skálafjørðinum, ella kanska allur sum hann er, lagdur saman í eina kommunu.

Í øllum førum er Rodmund Nielsen, borgarstjóri í Runavík, heitur talsmaður fyri at leggja kommunurnar saman.

Fyribils er avtala um at leggja Skála og Runavík saman, um fólkaatkvøðan í báðum bygdunum vísir, at fólkið vil.

Tekur fólkið undir við samanlegging, fara tær at arbeiða, sum um tær vóru ein kommuna longu frá 1. januar, men við hvør sínum bygdaráði. Formliga verða báðar kommunurnar so samanlagdar 1. januar 2005 undir navninum Runavíkar Kommuna.



*– Høvdu enn fleiri kommunur á Skálafjørðinum lagt saman, høvdu útlitini fyri alt øki verið ótrúliga spennandi, sigur Rodmund Nielsen*

– Tað eru vit samd um, men tað hevur ikki verið eitt krav frá okkum. Í Runavíkar Kommunu eru vit samd um, at navnið á kommununi skal ikki vera nøkur forðing fyri at leggja saman.

Rodmundur Nielsen sigur, at verða kommunurnar lagdar saman, fer tað at geva heilt aðrar møguleikar at leggja útbyggingar til rættis, tí tá fær stórkommunan eitt nógv størri øki til taks.

– Nógvar stórar vinnur standa fyri framman og tí hevur tað sera stóran týdning, at vit standa saman.

## Aðrar vælkomnar

Rodmund Nielsen sigur, at eru tað fleiri kommunur, sum eru sinnaðar at koma uppí, eru tær vælkomnar.

Hann sigur, at fyribils eru tað Runavík og Skála sum hava gjørt av at leggja saman.

– Men eru tað fleiri kommunur, sum hava hug at koma upp í eftir sama leisti, eru tær vælkomnar at gera vart við seg og tað verður neyvan nøkur forðing í tí

Rodmund Nielsen sigur, at tað hevði givið uppaftur betri møguleikar fyri at lagt til rættis og at styrkt Skálafjørðin sum ein vinnuligan miðdepil.

Skálafjørðurin er rættiliga víðførur, men Rodmundur Nielsen sigur, at tey hava ikki gjørt sær stórvegis tankar um at binda kommunan tættari saman.

Einaferð var frammi um at gera undirsjóvartunnil tvørturum Skálafjørðin.

– Tað hava vit ikki tosað um, men í longdini er tað eitt áhugavert mál at taka upp fyri at knýta bygdirnar meiri saman.

Í Runavíkar Kommunu búgva gott 2.500 fólk og á Skála útvið 700 fólkum.

Sostatt verður fólkatalið í samanløgdu kommununum eini 3.200 fólk og tað er ein stødd, sum ger, at kommunan verður betri før fyri at átaka sær fleiri uppgávur.

– Men tað hevði fleiri kommunur komið uppí, høvdu útlitini verið ógvuliga spennandi, sigur Rodmund Nielsen.

# Leiðbeining gav villleiðandi boð

**Pensjonistur á Tvøroyri fekk skeiv boð í leiðbeiningini á Lanssjúkrahúsinum og tað kostaði honum 100 krónur**

SAMSKIFTISTRUPULLEIKAR
*Áki Bertholdsen*

Ein gamal tvøramaður kom eitt sindur býtt fyri á Landssjúkrahúsinum nú ein dagin. Men søgan um tvøramannin sigur eisini eitt sindur um, at samskiftið á Landssjúkrahúsinum gongur ikki altíð, sum tað skal.

Tað var nú ein dagin, at 80 ára gamli Daniel Jacob Smidt Jensen á Tvøroyri var farin til eygnalækna á Landssjúkrahúsinum.

– Viðtalan gekk sum hon skuldi. Men á veg avstað aftur, fór hann í leiðbeiningina á Landssjúkrahúsinum at vita, nær Jón á Steig var at hitta, tí hann hevði eisini ørindi til hansara.

– Jú, hann var at hitta dagin eftir frá kl. 9-10, fekk eg at vita frá leiðbeiningini.

Morgunin eftir leigaði hann sær hýruvogn oman Landsjúkrahúsið, tað kostaði 50 krónur.

– Men har var onki at gera. Tá ið eg kom, gløddu tey við og spurdu, hvørji ørindini vóru hendan dagin? Eg segði, at eg hevði ørindi til Jón á Steig, sum eg var í viðtali hjá við jøvnum millumbili.

– Nei, tað nyttaði onki, tí hann var í feriu og kom ikki aftur, fyrrenn 1. oktober.

Hann sigur, at tískil mátti hann aftur leiga hýruvogn fyri 50 krónur avstað, uttan at fáa nakað burturúr.

Daniel Jacob Smidt Jensen vísir á, at Jón á Steig situr á einum av teimum ovastu rókunum á Landssjúkrahúsinum og hann heldur, at tað er ov galið, at Leiðbeiningin ikki skal vita so frægt.....